# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

**Svarari:** Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

**Evni:** Lærugreina- og skeiðstilboð á Setrinum

**Spurningar:**

1. Nær verður møguleiki at nema sær svimjilæraraprógv á Námsvísindadeildini aftur?
2. Hvussu nógvir lærarar hava tikið svimjilæraraprógv á Námsvísindadeildini seinastu 10 árini?
3. Nær verður møguleiki at nema sær telduvarðarútbúgving aftur?
4. Nær verður møguleiki at nema sær serlæraraútbúgving aftur?

**Viðmerkingar:**
Svimjilæraraútbúgvingin í fólkaskúlanum og á miðnámi er grundarlagið undir, at næmingarnir kunnu nema sær holla svimjilæru, og hvussu skúlaleiðslur skipa sínar ítróttatímar. Lærarar, sum undirvísa í svimjing, skulu hava svimjilæraraprógv, umframt at teir eiga at hava galdandi fyrstuhjálparskeið og lívbjargandi fyrstuhjálp. Fyrr stóð tað øllum læraralesandi í boði at taka svimjilæraraprógv, men svimjilæraraútbúgvingin hevur ikki verið boðin út seinastu árini, og tí bíða fleiri lærarar eftir at fáa møguleika at nema sær hendan lærugreinaførleika.
Fyri at undirvísa í svimjing eiga svimjilærarar eisini at hava dagførda lívbjargingarroynd. Møguleiki er at halda lívbjargingarroyndirnar úti á skúlum kring landið, tí nógvir skúlar hava svimjihyl á skúlanum.

Tað sama er galdandi fyri telduvarðarútbúgvingina. Skjótt eru 20 ár síðan, at telduvørður seinast er útbúgvin til at virka í fólkaskúlanum. Tí eru sera fáir útbúnir telduvørðir, ið virka í skúlunum í dag. Fleiri hava aðrar útbúgvingar og eru sjálvlærdir. Nú tá tøkniligu krøvini, bæði við tilfari, royndarvirksemi og trygd vaksa, eru eisini størri krøv til telduvørðirnar. Tí er ein útbúgving innan hetta økið ongantíð so viðkomandi sum nú, tá Løgtingið hevur samtykt, at fremjast skal ein nýggj KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið fyri 40 mió. kr.

Serlærarin er leiðarin í førleikastovunum í skúlunum. Nógv ár eru liðin, síðan henda útbúgving var bjóðað út. Flestu serlærarar eru komnir til árs í dag, og tí er átrokandi at útbúgva fleiri, um reglugerðir fyri førleikastovur skulu haldast.

Fyri at fáa greiðu á hesum spurningum, verður hesin fyrispurningur settur.

**Á Løgtingi, 18. oktober 2021**

Jóhannis Joensen